# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Martin Eið fyllir runt



Í dag, 22. desember, verður Martin Eið í Nesi fimmti ár. Martin er føddur og uppvaksin í Nesi. Foreldini eru Frits Eið, sáli, ættaður úr Porkeri og Betta Eið úr Nesi, Hvalba. Martin hevur tvær systrar, Jórun Eið, ið býr á Hellunum og Marjun Eið, sum býr á Præstø, Danmark.

Martin hevur stuðlað bygdafelaginum Royn heilt frá ungum árum av, hann spældi fótbólt í nógv ár og taldust millum bestu spælarar. Hann kann í dag minnast aftur á manga minnisríka løtu á vøllinum. Somuleiðis kann hann í dag fegnast um, at sonurin Frits eisini er ein ágrýtin fótbóltsleikari.

Martin er ein sera góður bakkamaður, heilt frá óvitaárum lærdi pápin hann at røkja bjørgini og at virða og hámeta náttúruna. Pápi hansara var seyðamarður á Hómrum í nógv ár, og mong fet eigur Martin har. Somuleiðis kann sigast, at Villingaberg kennir Martin sum sín egna lumma, og sum unglingur keypti hann eina hálva gyllin í Lítla Dímun. Fyri Martin, sum fyri flestu hvalbingar, er oyggin eitt sera týdningarmikið frístað, ið gevur heilsubót og nýggja megi til dagligdagin. Eitt av áhugamálunum hjá Martini eru veðrar og seyðahald, og nýggja hoyggjhúsið er sera væl úr hondum greitt, og hetta er Martin stoltur av. Fegin var hann, tá ið hann ognaði sær part í hagapartinum Uttara Hamrar og Undir Rókum. Fyri Martin er hetta ein týdningarmikil partur av mentan okkara, ið skal varðveitast og har unga ættarliðið skal lærast at fara væl um, hetta hevur Martin givið víðari til sonin, Frits, ið somuleiðis er djarvur til bakka.

Martin fór sum ungur í snikkaralæru hjá Sigmundi Strøm, sála, á Tvøroyri. Hann arbeiddi nakað aftaná innan hetta fak, fór síðan til skips.

Sjólívið hevur Martin dámað sera væl, hann hevur verið við norskum og síðani føroyskum trolara. Seinastu nógvu árini, hevur Martin siglt við Steintór, ið er heimahoyrandi í Hvalba. Í 1995 flutti Martin, konan og sonurin til Keypmannahavnar í 3 ár, har konan fekk sær útbúgving sum heilsurøktari, meðan Martin arbeiddi sum timburmaður.

Martin giftist í 1977 við Anna-Britt, dóttur Karin og Jacob Norðberg á Heyggi, Hvalba. Anna-Britt er heilsurøktari á Ellis-og Røktarheiminum á Tvøroyri. Tey eiga trý børn: Karin, Elisabeth og Frits. Og eiga tey fimm abba-, ommubørn. Asger 15 ár, Marianna 11ár, Sigvør 10 ár, Brandur 3 ár og lítla Tórur 6 mðr.

Martin og Anna-Britt hava bygt sær eini hús á Leitinum, í Nesi, og har hava tey skapt eitt sera hugnaligt og fjálgt heim.

Vit ynskja Martini og familjuni hjartaliga tillukku við fimmti ára føðingardegnum. Og ynskja honum framhaldandi eina bjarta lívsleið.

**Ein vinur**

## Andlát og jarðarferðir

**Ester Davidsen,** Æðuvík, andaðist á Eysturoyar Røktar og ellisheimi 20. desember 82 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hóskvøldið kl. 19.

Jarðarferðin verður úr Nes kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

Tey ið vilja minnast Ester kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konto í peningastovnunum.

Kistan við **Jens Christian Dam,** ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Kaldbak fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum í dag klokkan 17 í Vesturkirkjuna.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni Tollaksmessudag klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Jens Christian kunnu lata eina gávu til Leguhúsið í Nesvík.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum mongu, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði sonur og beiggi

**Magni Nolsøe**
Vágur

andaðist og varð jarðaður.

Vit kunnu ikki seta orð á, hvussu takksom vit eru fyri tað fantastisku hjálpina, sum var veitt okkum í svárastu tíð okkara so:
Hjartaliga takka øll somul

**Vígdis, Curt og Una**

## Dagurin í morgin

**23. desember. Tollaksmessa**. Dagurin hevur navn eftir íslendska prestinum Tollaki, sum gjørdist prestur í Skálholti. Hann stóð í hørðum stríði við mætar høvdingar í Íslandi, men eftir deyða hansara í 1193 var tað skjótt, at hann varð mettur sum mikið halgimenni. Dagurin verður nú á døgum mest róptur *lítli jólaaftan*. Tollaksmessudagur var annars í Føroyum fastur dagur at stoyta kertu. Norrøna navnið Tollakur merkir *Tórs stríð* ella *leikur.*

## Karl Rasmussen 50 ár



Týsdagin 20. desember fylti Karl Rasmussen á Skála 50 ár. Karl er skálamaður. Hann hevur nú í mong ár arbeitt sum sølumaður á bilasøluni hjá Reyni Service í Hoyvík.

Sum ungur sigldi Karl. Hann hevur eisini arbeitt á amboðsdeildini hjá Thomas Dam í Havn og sum bilasølumaður hjá Wenzel Petersen og Bilfríðkan. Eina tíð arbeiddi hann hjá Skálafjarðar Málingahandli. Hann hevur eisini verið onkran túr aftur til skips.

Við sínum stóra áhuga fyri bilum trívist Karl væl sum bilasølumaður. Hann er fyrikomandi, hevur gott fólkatekki og sera gott minni. Áhugin fyri bilum hevur altíð verið stórur, og hann hevur fingist nógv við bilar.

Tað eru ikki bara bilarnir sum hava hansara áhuga. Hann fylgir væl við í øllum sum gongur fyri seg í samfelagnum og er sera familjukærur.

Foreldrini hjá Karl vóru Jonetta, f. Isaksen úr Vestmanna, og Reynold Rasmussen á Skála. Tey eru fýra systkin: Hanna, Karl, Poula og Jonhild.

Karl er giftur Maiken Haraldsen úr Vestmanna. Tey eiga tvey børn, Rúni og Lív.

Føðingardagin var Karl burturstaddur.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!